# THE LAND OF THE FREE

BYRJAÐ VAR **TÍÐLIGA** UM MORGUNIN, OG **TÚRURIN** GEKK MÓTI **CENTRAL PARK**, SUM LIGGUR Í **UPTOWN**, SUM TEY SIGA **HER**



**3. PARTUR**

Albert Isfeld
post@sosialurin.fo

### Hósdagin 10. juni

***CENTRAL PARK OG GUGGENHEIM MUSEUM***

Uttanfyri garðin kring Central Park standa nógvir hestavognar við kuskum, og bjóða seg fram til okkum turistar og helst sæðst tað á okkum, at vit eru touristar tí skjótt vóru teir á okkum at bjóða seg fram, og tóku vit av og fóru túrin inn í parkina í hestavagni – ein sera góður túrur í hesi stóru park, sum liggur sum eitt lunga mitt í New York – parkir í New York eru ikki nógvar og tað er at harmast um at býarplanleggjararnir her ikki hava givið parkum og grønum økjum meira gætur.



*Central Park*

Komin heimaftur nærhendis hotellið, beint við Madison Square Garden, fóru vit í ein sightseeing bus og tóku vit túrin runt í Downtown. Hetta er serliga áhugaverdur túrur, tí tá kemur man framvið at kalla øllum teim áhugaverdu og kendu skýskravarunum, og man situr á 2. hædd í dupultdekkaranum (sum í London) og hyggur upp á teir fjallahøgu skýskravararnar – Empire State er 381 metrar høgur og sostatt hægri enn Kirkjubøreyn.



*Guggenheim Museum*

### Fríggjadagin 11. juni

***BÝTÚRUR OG YNSKI UM AT KOMA ÚT Á LIBERTY ISLAND OG BROADWAY***

Vit fóru uppá dupultdekkaran uttanfyri Macy's og fóru, sum tað eitur ein »Downtown loop« við bussinum, og ætlanin var at fara við ferguni til Liberty Island, har Liberty standmyndin stendur, hon er ein gáva frá Frankaríki til USA, og Ellis Island har immigrantarnir, sum komu til USA blivu kannaðir og fingu innferðarloyvi um alt annars var í ordan.

Vit høvdu fingið at vita umborð á bussinum, at tað kostaði onki at vitja har. Vit fóru so góðtrúgvin upp í køina, sum var fleiri hundrað metrar long, mannað við fólki við øllum tungumálum. Tá vit høvdu staðið í kø í umleið ein tíma, fingu vit at vita, at vit skuldu hava billet, og at tað als ikki var ókeypis at fara út á Liberty Island. Vit máttu nú fara úr køini at keypa billettir og síðani aftur í køina í ein tímas tíð afturat. Hetta tímdu vit ikki, so vit avgjørdu at gera túrin næsta dag, og heldur brúka restin av degnum at royna tað amerikanska whiskeyi, sum er t.d. Jack Daniels og Bourbon og nakað av góðum amerikanskum víni afturvið eini betri máltíð.

Meðan vit ganga her í Battery Park hava vit gott útsýni yvir Hudson ánna og havnainnlopi og greitt er at tann fyrr so lívligi havnabýurin er »ein saga blot« tí nu leggja skipini at longri úti á flógvanum og yviri á New Jersey síðuni og aðrastaðni.

### Leygardagin 12. juni

***LIBERTY STATUE OG ELLIS ISLAND, MILLUM TEY HALGU OG TEATUR Á BROADWAY***

Farið verður tíðliga upp fyri at verða í góðari tíð til køina, so hon ikki verður ov long, seinast vit vóru har, vardi hon umleið 1 tíma.

Men tað er als ikki keðiligt at standa í kø her, tí tað hendir so nógv rundanum teg alla tíðina, fólk, sum vilja selja alt millum himmal og jørð, ur, vatn, sodavatn, søtmeti , souveniers og annað. Og musikantarnir, teir eru nakað fyri seg, helst mest ósmæðna fólkaslag í verðini. Teir spæla uppá øll hugsandi instrumentir og standa so passaliga langt frá hvørjum øðrum,at teir ikki órógva hvønn annan, bróðursolidaritetur væl saktans, og so spyrja teir »køistarnar« hvar teir koma frá, vit søgdu Skandinavia og beinanvegin fór hesin myrki maðurin at spæla »Kong Christian stod ved højen mast« ...mítt fullveldishjarta hvepti seg, men vit undraðust á at hann kendi hetta lag. Og so eru tað teir ungu dreingirnir fram við køini (eisini myrkir) sum dansa break og gera fimleik og anna til undirhalds, so tað hendir okkurt alla tíðina, so um tú keðir teg í NY – statt í kø.

Vit skuldu nú gera rætt og keyptu okkum billettir til ferguna út á Liberty Island, men hana fingu vit til keyps frá einum latínskum manni, sum kundi bert nøkur fá ensk orð, og billettina seldi hann okkum fyri ein dollar meira enn hon skuldi kosta, hetta varnaðust vit seinni tá vit komu umborð á ferguna.

Men nú aftur í køina, sum var lika lang ella longri enn í gjár – góðan tíma um at koma umborð.

Siglitúrurin var fínur við hesu, at at líta á, so heimagjørdu fergu – ein skuldi trúð, at ein supermagt hevði orku og vilja til meira enn hesa ússaligu fergu, at fragta ferðafolk úr øllum heimi til teirra nationalu klenodiu.

Men sum sagt, túrurin var fínur og fergan var á tremur við fólki, og útsýnið til New York var av besta slag, og fototólini kliktu sum maskinbyrsur úr túsund múlum.

Standmyndin stendur á einum fundamenti í skapi sum ein skansi og er hon imponerandi at hyggja at í øllum sínum veldi, hon er 93 metur høg og vigar 225 tons og bleiv reist í 1886. Tað var tann tá kendi franski listamaðurin Frederic-Auguste Bartoldi sum gjørdi standmyndina av frælsisgudinnuni og brúkti hann mammu sína til model. Sum omanfyri nevnt, er hon ein gáva frá fronsku tjóðini til tað amerikanska fólki.

Í fundamentinum standa hesi orðini hjá Rithøvundanum Emmu Lazarus:

*»Gev mær tínar troyttu, tínar fátæku, tínar samanstúgvaðu fjøldir, sum leingjast at anda í frælsi«.* (frítt týtt av A.I.)

Nú vit vóru komin at standa undir frælsisgudinnuni, skuldu vit fara inn í hana, og aftur blivu vit steðgaði her, tí fyri at koma inn í hana, skuldu vit havt keypt billet fyri 14 døgum síðan, so har var onki at gera, og vit kundu onki havt gjørt kortini, tí vi høvdu bert verið í New York í 4 dagar, so tað er ringt at siga hvussu turistar skulu koma inn í hana, um teir ikki eru meira enn



*Battary Park*